# ntinskur fongsulslærari



Hetta, segði hon frá, er fyri at man kann reinsa tankar sínar og hugsa um brotsgerðina, man hevur framt. Hendan mannagongd er vanliga eisini nýtt, beint eftir at man er fangaður av løgregluni. Tríggjar teir fyrstu dagarnar skal man vera einsamallur í hesu lítlu selluni, har einasta kommunikatiónin við umheimin er ígjøgnum strongu vaktirnar.

- Vit eru rættiliga heppin í so máta; í nærum øllum hinum ungdómsfongslunum halda tey framvegis, at kroppslig revsing er tann einasti hátturin, man lærir av feilum sínum. T.d. liggur eitt nonnuungdómsfongsul tætt við her, har nonnurnar sigast at fara rættiliga harðliga fram ímóti teimum ungu. Tað er gott, at man ikki er endaður har, segði hon, meðan hinar nikkaðu harðligt aftanfyri.

Restina av degnum brúktu vit saman við gentunum við at verða bankaði av í argentinskum kortspølum, meðan tær allar flentu í kíki eftir okkara manglandi dugnaskapi á hesum økinum. Tá ið vaktirnar seinnapartin stongdu genturnar inni í sellurnar til siesta og Henrique og eg ótu stóra portrið aftur aftan fyri okkum, var eg fylt av mótstríðandi kenslum. At skula brúka síni tannáringarár innistongdur í einari lítlari sellu saman við 19 øðrum gentum er einki lív, tað er heilt greitt. Hvørjar umstøður í stutta lívi teirra hava gjørt, at tær hava framt hesar brotsgerðir? Ger fongslið tær til betri samfelagsborgarar? Um onkur teirra longu hevur verið fonglað fleiri ferðir, hevur fonglingin kanska ikki havt jaliga árini, løgreglan vónaði. Tá ið eg samanberi hesar tannáringar við føroyskar tannáringar, hava tær nógv til felgs. Tær elska at flenna, tvætla og roksa, hetta er als ikki deprimerandi hugburðurin, eg hevði ímyndað mær.

Á vegnum út vóru vit steðgaði av einum vaktarfólki, ið broytti mína áskoðan á genturnar.

- Orsøkin til, at genturnar eru so friðarligar og hava vanligan atburð í fongslinum, greiddi hon frá, er, at tær hvønn morgun fáa dempandi heilivág. Tær koma allar frá fátøkum familjum, har tað snýr seg um yvirliva til næsta dag.

Her eru lítlu samfelags-tapararnir, sum enn líða undir stóra fíggjarliga kollapsinum av argentinsku peso'ini í 2001. Hóast tann yngsta gentan her ikki verður 13 fyrr enn um tvær vikur, hava tær nærum allar í mong ár havt álvarsligar trupulleikar við rúsevnismisnýtslu, sum hava ført við sær, at nógvar eru komnar út í kriminalitet fyri at vinna pengar til at rúsa seg og at halda absistensunum niðri. Hesar genturnar eru komnar so langt út, at tær hava framt ta størstu syndina av øllum og eru vorðnar tannáringarmordarar og tí eru tær endaðar í hesum niðurslitna, gráa bygningi,

ið mest av øllum minnir um ein gamlan bygning í gamla USSR.

- T.d. hevur ljóshærda gentan, sum bankaði tykkum av í kortspølunum, dripið óynskta barn sítt við í desperatión at koyra tað inn í eina frystiboks, segði vaktin frá.

## Týsdagur 17. februar 2009

Tað er tryggjandi, at Henrique eisini er her fyri at starvast saman við mær. Hóast eg nú havi roynt eitt sindur av hvørjum bæði her í Suðuramerika og tá ið eg fyri hálvum ári síðani vitjaði Niger, eitt tað fátækasta landið í heiminum, setir hendan upplivingin tingini enn meira í perspektiv fyri meg.

Tá ið man heimanifrá situr og hugsar um at fara út "at hjálpa", ið tað er vorðið so populert at taka til, hava mong ivaleyst eina idylliseraða fatan av, at "nú skal man út at bjarga øllum neyðars fátøku børnum heimsins".

Man hoyrir dag og dagliga so nógv um alla neyðina kring heimin, so nógv at man at enda verður immunur yvir fyri hesum upplýsingum og sløkkir útvarpið, tá ið tey aftur byrja at tosa um nýggjastu náttúruvanlukkuna í Asia ella nýggjasta bumbuálopið í Miðeystri. Man verður fyltur við máttloysi, eini kenslu av hvussu stórur heimurin er og hvussu lítil og ótýðandi man sjálvur er í øllum hesum. Tað einasta, sum tykist at kunna hjálpa móti hesum máttloysi – ella kanska heldur hjálpa upp á hesa ringu samvitsku, ið máttloysið hevur við sær, er, at man sjálvur kann gera okkurt aktivt í tilveruni. Tað er tá "superman-kenslan" tekur yvir. Sum vøkru Barbie "Miss World"-genturnar vanliga taka til "I just want world peace" – og eg kann vera við til at skapa heimsfriðin, eg kann hjálpa øllum, eg kann gera ein mun. Tað er ivaleyst eisini satt, at vit øll kunnu gera ein mun í heiminum – tað havi eg við egnum eygum ásannað nógvar ferðir, bæði heima í Føroyum og í Evropa, men eisini í stóra umheiminum kring oyggjar okkara – tað er tó nakað nógv lættari at hjálpa heiminum, um heimurin stendur saman um at gera ein mun, um heimurin hevur eitt ynski um sjálvur at verða hjálptur úr trupulleikunum. Tað er hopleyst at hjálpa fólki, ið ikki sjálvi ynskja hjálp.

Eg haldi, at nærum allar genturnar eru hálvforelskaðar í starvsfelaga mínum, Henrique. Tá ið eg havi ringt við at formulera meg á argentinska slangmálinum, genturnar nýta í heilum, traðkar hann til við onkrari spanskari joke. Hann er hálvur meksikanari og seinastu mánaðirnar hevur hann ferðast runt í nærum øllum suðuramerikansku londunum fyri at síggja øðrvísi partar av hesum náttúruríka heimsparti, enn turistar vanliga síggja, fáa upplivingar, eingin annar kann skriva heim um.

Tað er ein løgin kensla at skula vera tann vaksni, sum knappliga hevur ábyrgd av einum so stórum bólki av gentum, ið hava verið útsettar fyri harðskapi, fátækradømi og rúsevnismisnýtslu meginpartin av lívi teirra. Tað er løgið knappliga at skula vera ein autoritetur fyri gentur, ið bert eru nakrar mánaðar yngri enn ein sjálvur og tað er ringt at verða respekteraður, tá aldurmunurin er so lítil. Fyri at fyribyrgja hesum síðsta, hava vit billa teimum inn, at vit bæði hava lisið enskt á universitetsstøði og eru ávíkavíst 22 og 23 ár. Í veruleikanum eru vit jú bæði bert eru 19-ára gomul og hava tikið studentsprógv fyri minni enn einum ári.

At fáa argentinsku tannáringagenturnar til at lurta eftir er ikki altíð lætt. Heilt fáar av teimum duga at lesa og skriva - nógvar hava ongantíð fylgt eini vanligari skúlagongd – og tær vilja helst brúka alla tíðina til at roksa og flenna. Serliga eru tvær gentur, ið ferð eftir ferð órógva og gera balladu. Ein teirra tykist at hava rættiliga álvarsligar persónligar trupulleikar. Fyrsta dagin eg varð í fongslinum, ivaðist eg – hóast eg longu visti, at her bert búgva gentur – í, um hon í veruleikanum kundi verið ein drongur, sum av tilvild hevði sníkt seg inn í hetta gentufongslið. Báðir undirarmar hennara hava lang, reyð arr, eftir at hon hevur skorið seg sjálva nógvar ferðir. Til hvønn enskttíma situr hon einsamøll og sær súr út, meðan hon mumlar illsint orð og roynir at órógva undirvísingina so nógv, sum til ber. Hin gentan hevur stutt og skríggjandi pink hár. Hon líkist mest av øllum einari karikaturútgávu av einari